TV Telefonpíð
Fleiri rásir - einki roks

# Robinson – Landsdystur

TV3 mánadagin 10. jan. kl. 19.00

15 kendir persónar úr Danmark, Svøríki og Noreg fara í 14 sjónvarpskvøld at stríðast um heitið sum besti kendi Robinson í Norðanlondum.

Hvørt land hevur fimm luttakarar, og skulu hesi stríðast bæði við og ímóti hvørjum øðrum í eini røð av Robinson dystum. Sum vant, so endar hvør dagur við, at ein luttakari skal sendast heim við atkvøðugreiðslu. Hetta verður gjørt á tann hátt, at tað liðið, sum tapir fyri hinum báðum londunum, skal á Oyggjaráðnum atkvøða um, hvør av teirra egnu luttakarum skal sendast heim.

Høvuðsvinningurin í kappingini er ein hálv millión, og verður tað bara endaligi vinnarin, sum fær ágóðan av hesum.

Danski verturin í sendingini er Mikkel Beha Erichsen.



*Danska liðið í kappingini: Saseline Sørensen, Asbjørn Riis, Frederik Fetterlein, Warny Mandrup og Anne Larsen.*

### Luttakararnir:

**Danmark:**
Frederik Fetterlein, tennisspælari
Saseline Sørensen, fyrrv. sangari í SOAP
Anne Larsen, kókibókahøvundur
Asbjørn Riis, wrestlari
Warny Mandrup, sjónleikari

**Svøríki:**
Frank Anderson, wrestlari
Mårten Andersson, útvarpsvertur
Denise Lopez, sangarinna
Tilde Fröling, sjónleikarakvinna
Peter Wahlbeck, skemtari og sjónleikari

**Noreg:**
Jan Simonsen, politikari
Janne Rønningen, skemtari
Ole Klementsen, nevaleikari
Lene Elise Bergum, sjónleikarakvinna
Gry Jannicke Jarlum, sangarinna og rithøvundur

# *Temaleygardagur* – Hægsta norður

DR2 leygardagin kl. 18.30

### Kvøldið við skíggjan

18.30 Temaleygardagur: Hægsta norður
18.33 Tvørtur um innlandsísin – Ice Cap 225
19.25 Ísbjarnanna land
20.15 Ein dani á Norðurpólinum (1)
20.20 Peary ella Cook? – Dysturin í Norðurpólin
20.35 Kapprenningin til Norðurpólin
21.20 Ein dani á Norðurpólinum (2)
21.30 Deadline



*Stolti kongurin í arktiska økinum, ísbjørnin, er sjálvandi eisini partur av temaleygardegnum á DR2*

Ísbjarnir, stórsligið landslag og dramatiskar ferðir. Temaleygardagurin hesaferð snýr seg um tríggjar tímar við spennandi upplivingum.

Frá lívinum hjá Ísbjarnum á innlandsísinum til ómenniskjansliga dystin hjá pólfararunum í teirra stríði fyri at náa málinum, sjálvasta Norðurpólinum.

Byrjað verður við eini sending um fyrstu royndina, sum nakran tíð varð gjørd at koma tvørtur um innlandsísin í Grønlandi í bili. Danski Lasse Rungholm og íslendski Arngrímur Hermansson vóru teir, sum gjørdu royndina, sum ikki var heilt vandaleys.

Síðani verður hugt at ísbjørnini. Stóri kongurin í oydna arktiska landslagnum. Hvussu ber tað til, at eitt somikið stórt djór kann fáa nóg mikið av føi í einum somikið oydnum landslagi.

Tað eru bert fáar vikur lidnar, síðani 39 ára gamla Bettina Aller vann seg fram á Norðurpólin. Ríki arvingurin stríddi seg yvir 1.000 kilometrar yvir frysta havið uttan nakra hjálp frá hvørki hundum ella kavascootarum. Bara skí hevði hon at líta á, og við hesum vann hon fram á mál í einum av stóru dreymum hennara.

At enda verður hugt eftir, hvussu leikur fór, tá menn av fyrstan tíð vildu vinna á stóra íshavinum.

Fridtjof Nansen og Robert Peary stríddust um heitið, men hetta tóktist ikki nóg mikið. Allur heimurin fylgdi við stríði teirra, og 6. apríl í 1909 kundi Peary skrivað í dagbók sína: »Norðpólurin – loksins«. Men alt var ikki av fyri tað. Í Keypmannahavn trein Frederick Cook fram og segði, at hann í veruleikanum var tann, ið var fyrstur á pólin.